

HANDILSVINNUFELAGIÐ

# FØROYSK PANTSKIPAN

# INNIHALD

1. Samandráttur og stutt um Handilsvinnufelagið . . . . . . . 3
1.1 Samandráttur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 3
1.2. Stutt um Handilsvinnufelagið . . . . . . . . . . . . . . . . . . 3
2. Hví eina felags pantskipan? . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 5
3. Mannagongdir og fyrivarni . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 5
4. Grundarlagið fyri pantskipanini . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 6
4.1 Sett mál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 6
4.2 Hvat er galdandi? . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 7
4.3 Støðan í dag . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 7
5. Loysnin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 9
5.1 Alment um loysnina . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 9
5.2 Brúkarin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 9
5.3 Handlarnir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 9
5.4 Avheintanin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 10
5.5 Móttøkustøðin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 11
5.6 Tøkniliga skipanin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 11
6. Skipan av P/f Panta . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 11
7. Løgfrøði og fígging . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 12
7.1 Fígging . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 12
7.2 Løgfrøði . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 12
8. Langtíðar mál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 13
9. Endaligar viðmerkingar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 13
9.1 Gildiskoma . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 13
9.2 Næsta stig . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 15

## 1. SAMANDRÁTTUR OG STUTT UM HANDILSVINNUFELAGIÐ

### 1.1 Samandráttur

Handilsvinnufelagið skjýtur upp, at innflytarar og framleiðarar stovna felagið P/f Panta, sum skal standa fyri pantskipanini í Føroyum. Nýggja loysnin lættir munandi um hjá brúkaranum, sum nú sleppur av við øll síni endurnýtsluíløt[1] á einum stað. Sundurskiljingaruppgávan hjá handlunum verður munandi minkað og minni umsiting krevst av handlunum. Loysnin hjá Handilsvinnufelagnum leggur pantskipanina í Føroyum í fastar og skipaðar karmar og setur brúkaran og umhvørvið í fremstu røð.

### 1.2. Stutt um Handilsvinnufelagið

Handilsvinnufelagið hevur til endamáls at savna føroyska handilsvinnu í ein vinnufelagsskap at útinna felags áhugamál.

Í virki sínum skal felagið skipa fyri felags menning í vinnugreinini, bæði í virkjunum, og av teimum karmum virkað verður undir. Millum limirnar skal felagið stuðla undir samskifti og førleikamenning, og úteftir virka sum felags málgagn mótvegis myndugleikum, stovnum og aðrari vinnu, herundir:

- Menna og ávirka útbúgvingarskipanina fyri handilsvinnuna
- Betra um rekrutering av arbeiðsmegi til vinnugreinina
- Menna handilsvinnu gjøgnum kunning og skeið
- Greina og vísa á týdningin av handilsvinnuni
- Ávirka og menna karmarnar fyri at reka handilsvinnu
- Hoyring av lóggávu

*[1] íløt, sum eru áløgd pant sbrt. kunngerð. Í kunngerð og lóg eru nevndu heitini einnýtsluíløt og endurfyllingaríløt. Hesi heiti verða í loysnini hjá Handils-vinnufelagnum løgd saman í eitt orð, nevniliga endurnýtsluíløt. Sí annars ll. nr. 47 frá 15. mai 2007, §§ 1 og 2 fyri nærri lýsing av heitunum í lógartekstinum.*



## 2. HVÍ EINA FELAGS PANTSKIPAN?

Mangan verður sagt, at neyð lærir nakna kvinnu at spinna. Í gomlum døgum komst tú ikki langt, um tú ikki dugdi kynstrið at endurnýta. Klæði gingu í arv, vórðu seymað um, tilfar var endurnýtt í húsabygging og forfjónað tilfar var umskapað til kassabilar og aðrar góðar lutir. Dømini eru mong, men tað er greitt, at vit spara, tá ið vit endurnýta. Vit spara orku og ráevni og royna at fáa sum mest burtur úr tí tilfeingi, vit hava, og fara væl um okkara umhvørvi.

Tað er gløgt at vísa skynsemi, eisini hóast vit í dag hava góðar tíðir og líða onga neyð. Umhvørvisdálking og veðurlagsbroytingar eru í dag veruligir trupulleikar, sum allir partar í samfelagnum mugu taka atlit til. Í Føroyum liva vit nær náttúruni og í stóran mun av náttúruni, so hóast Føroyar eru eitt pinkuland í heimshøpi, ger alt mun. Eisini ein smidlig føroysk pantskipan.

Sølan av eingangsíløtum er vaksandi í Føroyum sum aðrastaðni, og vøruúrvalið gerst størri og størri. Vaksandi framleiðslan herðir trýstið á umhvørvið, og neyðugt er við endurnýtsluskipanum at verja umhvørvi og náttúru. Í Føroyum hava vit havt pant á endurnýtsluíløtum síðani 2007, og vit hava eitt afturberingarprosent, sum næstan er á sama høga støði sum í Danmark.

Tó er nøgdsemið ikki við pantskipanina í Føroyum. Misnøgd er millum brúkarar um at skula ferðast úr einum handli í annan fyri at sleppa av við sínar fløskur. Fyri handlarnar er sundurskiljingaruppgávan óneyðuga tíðarkrevjandi og fløkjaslig, og innflytarar og framleiðarar koyra allir eftir hvør sínari skipan og heinta síni íløt hvør í sínum lagi við hvør sínum flutningsbili.

Handilsvinnufelagið hevur tí sett sær sum uppgávu at gera eina einkla og smidliga pantskipan, sum er sergjørd til føroysk viðurskifti, og sum setur brúkaran og harvið eisini umhvørvið í fremstu røð.

## 3. MANNAGONGDIR OG FYRIVARNI

Nógv áhugamál eru í málinum og torført er koma fram til eina loysn, ið hóvar øllum pørtum eins væl. Handilsvinnufelagið setti sjøtul á

uppgávuna longu í 2012, støðgur kom síðani málið í 2013. Í desember 2015 var semja um at taka málið uppaftur. Hetta var gjørt av egnum áðum, tí hildið var ikki at verandi skipan er nútíðarhóskandi. Síðani hevur málið verið javnan umrøtt í miðlunum, eins og fyrispurningar hava verið um málið í Løgtinginum.

Mannagongdin hevur verið at byggja víðari á uppskotið frá 2013. Felagsfundir hava verið hildnir við innflytarar og framleiðarar frá byrjan í 2015, bæði viðvíkjandi íverksetan av verkætlanini og síðani ávegis kunningarfundir. Somuleiðis hava dýpdarsamrøður verið við somu partar, og endaliga uppskotið hevur eisini verið til viðmerkingar hjá teimum. Uppskotið hevur harumframt verið viðgjørt á limafundi í Handilsvinnufelagnum.

Harumframt hava samrøður verið við innsavningarstøðir, flutningsfyritøkur, Kommunufelagið, Umhvørvisstovuna eins og kunningarfundur hevur verið fyri Heilsu- og Innlendismálaráðnum.

Í verandi støðu eru nakrir partar av núverandi pantskipan partur av Dansk Retursystem. Tá ið nýggja skipanin kemur í gildi, verður hetta ikki galdandi longur.

## 4. GRUNDARLAGIÐ FYRI PANTSKIPANINI

### 4.1 Sett mál

Málið er, at nýggja skipanin skal veita eina skynsama útbýting og afturbering av endurnýtsluíløtum við hesum umhvørvismálum fyri eyga:

- Fáa so nógv endurnýtsluíløt innaftur sum gjørligt
- Tað skal vera lætt at sleppa av við endurnýtsluíløtini

Innsavningin av endurnýtsluíløtum gevur í dag sítt íkast til at skapa ein rúmligan arbeiðsmarknað, har rúm er fyri øllum, og hildið fer at verða fram eftir sama leisti í framtíðini. Við nýggju pantskipanini arbeiða vit fyri eini felags søk og taka felags tøk við skynsemi og samfelagsanda fremst í huga.

Skipað verður fyri, at ein góðgerðarpulja verður sett á stovn, eins og ein árlig heiðursløn verður handað til umhvørvisvinarligt endamál.

Tað verður mett týdningarmikið, at pantskipanin verður sjónlig í samfelagnum og eggjar fólkið til at hugsa um umhvørvið. Málið er, at umhvørvisliga tilvitanin millum fólk fer at økjast, so hvørt sum skipanin festir røtur í samfelagnum.

### 4.2 Hvat er galdandi?

Pantøkið í Føroyum er skipað við:

- Løgtingslóg um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 47 frá 15. mai 2007
- Kunngerð um íløt, úrdráttir og pant, sum broytt við kunngerð nr. 39 frá 16. mai 2011

Í lógini stendur millum annað, at øll, sum framleiða, innflyta ella selja íløt, sum eru áløgd pant, skulu taka ímóti tómum íløtum av tí slagi, ið tey selja. Harafturat stendur, at til ber at samskipa og samstarva við annan part um umsitingina av panti, innsavning og avhendan av tómum íløtum.

Sambært kunngerðini skulu íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir, sum eru gjørd úr glasi, plasti og metalli, áleggjast pant. Pantið er soljóðandi:

1) Kr. 2,00 við MVG fyri endurfyllingaríløt, sum rúma 0,5 litrum ella minni.
2) Kr. 4,00 við MVG fyri endurfyllingaríløt, sum rúma meira enn 0,5 litrum.
3) Kr. 2,00 við MVG fyri einnýtsluíløt, sum rúma 0,5 litrum ella minni.
4) Kr. 4,00 við MVG fyri einnýtsluíløt, sum rúma meira enn 0,5 litrum.

Í kunngerðini stendur somuleiðis, at pant kann verða kravt og latið í sambandi við proviantering til toll- og avgjaldsfría nýtslu og sølu. Verður pant í hesum føri kravt og latið, skal tað verða eftir somu mannagongd, sum nevnd er omanfyri.

Sambært lóggávuni er pant ikki álagt vín- og brennivínsíløt, hóast hetta verður framt í Føroyum í løtuni.

### 4.3 Støðan í dag

Tøl frá Umhvørvisstovuni vísa, at á leið níggju milliónir eindir fara í umfar um árið. Tá eru fløskur, ið verða vaskaðar, fløskur frá Tax Free og fløskur frá skipum ikki taldar uppí.

Gongdin í søluni av einnýtsluíløtum í Føroyum




Søla av einnýtsluíløtum í Føroyum, 2008–2016

| | Metall | Plast | Glas | Íalt |
|---|---|---|---|---|
| **2008** | 1.129.975 | 815.342 | 634.408 | 2.170.725 |
| **2009** | 1.351.546 | 2.228.340 | 83.192 | 3.663.078 |
| **2010** | 2.015.415 | 2.711.466 | 178.947 | 4.905.828 |
| **2011** | 2.378.576 | 3.873.518 | 317.628 | 6.569.722 |
| **2012** | 3.404.886 | 3.841.983 | 361.437 | 7.608.306 |
| **2013** | 3.326.284 | 3.726.234 | 345.588 | 7.398.106 |
| **2014** | 4.059.780 | 5.041.751 | 206.225 | 9.307.756 |
| **2015** | 4.251.509 | 4.288.974 | 187.699 | 8.728.182 |
| **2016** | 4.303.047 | 4.583.133 | 254.626 | 9.140.806 |

Kelda: Umhvørvisstovan

Vit síggja samstundis, at afturberingarprosentið gerst hægri og hægri. Í 2016 lá tað á heili 89% í mun til 70% í 2010, so gongdin hevur verið framúr góð.

| Retur % | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Metal** | 68 | 75 | 68 | 81 | 75 | 87 | 87 | 89 | 94 |
| **Glas** | 38 | 57 | 28 | 72 | 85 | 88 | 118 | 94 | 84 |
| **Plast** | 29 | 63 | 74 | 79 | 79 | 79 | 85 | 93 | 84 |
| **Íalt** | 53 | 67 | 70 | 80 | 78 | 83 | 87 | 91 | 89 |

Kelda: Umhvørvisstovan



# 5. LOYSNIN

## 5.1 Alment um loysnina

Uppskotið hjá Handilsvinnufelagnum er grundað á, at neyðugt er samskipa fyrisitingina av pantinum í eitt felag við skynsamum rakstri borgara, samfelagi og umhvørvi at gagni. Nýggja pantskipanin verður nevnd Panta, og hon skal tryggja, at brúkarar sleppa av við øll síni endurnýtsluíløt á einum stað. Harafturat hevur tað týdning, at endurnýtsluíløt verða sædd sum handilsvøra, og at tað skal loysa seg hjá handlunum at taka ímóti endurnýtsluíløtum. Panta skal tryggja lágar prísir til brúkaran, og verður virksemið tí regluliga tillagað.

## 5.2 Brúkarin

Í nýggju skipanini verður brúkarin settur í fremstu røð. Brúkarin fer ikki at ivast í, hvar endurnýtsluíløtini kunnu latast inn, og sannlíkindini at




fáa øll íløtini innaftur verða munandi størri. Fólk verða væntandi meira tilvitað um pant, tá ið ein føroysk pantskipan fer at virka, sum tekur støði í føroyska brúkaranum.

## 5.3 Handlarnir

Kundin letur endurnýtsluíløtini inn á støðunum kring landið. Akkurát sum vanligt. Flestu handlar fáa sær sjálvsølur. Handlarnir savna endurnýtsluíløtini í posar frá Panta, sum eru merktir til handilin. Posarnir



verða síðani heintaðir í mun til innsavningina hjá einstaka handlinum. Alt í alt verður tað lættari og meira ómakaleyst hjá handlunum.

Í dag verður í mongum førum givin ein móttøkusamsýning til handlarnar, og ætlanin er at varðveita hesa mannagongd. Móttøkusamsýningin frá Panta endurspeglar ta tænastu, handilin veitir, í mun til tær íløgur, ið eru gjørdar í sjálvsølur.

Møguleiki skal tó verða fyri, at sølustað kann søkja Panta um at verða undantikið at taka ímóti, um so er, at tað kann grundgeva fyri serligum umstøðum.

Serligar umstøður kunnu verða, at fleiri í økinum taka ímóti, og at innlatingarstøð tí ikki tróta borgaranum.

Teir handlar, sum taka í móti øllum endurnýtsluíløtum, taka eisini íløt inn sambært kunngerð um íløt, úrdráttir og pant, men sum ikki eru áløgd pant. Panta tekur sær av at burturbeina hesi íløt.

**5.4 Avheintanin**
Panta útveitir meginpartin av sínum virksemi og ger tí avtalu við flutningsveitara um at heinta posarnar eftir einari fastari skipan. Tað verður mett, at henda loysnin verður ikki dýrari at reka enn núverandi loysn, har allir veitarar koyra hvør í sínum lagi eftir sínum íløtum.

Innheintanin hjá Panta skal verða so skynsom sum møguligt. Umhvørvisatlit eiga at viga tungt, og tøkur kapasitetur eigur tí at verða nýttur í so stóran mun sum gjørligt.

**5.5 Móttøkustøðin**
Endurnýtsluíløtini verða latin til eina skikkaða innsavningarstøð, sum hevur sjálva móttøkustøðina. Støðin ger neyðugu íløgurnar, og Panta rindar tænastugjald til innsavningarstøðina. Tann parturin av íløtunum, sum skal vaskast, verður fluttur til tey, sum vaska.

**5.6 Tøkniliga skipanin**
Skipanin skrásetir sjálv alt, sum kemur inn og avroknar beinleiðis við Panta. Møguligt verður framhaldandi at taka ímóti endurnýtsluíløtum uttan at hava sjálvsølu.

## 6. SKIPAN AV P/F PANTA

P/F Panta verður skipað sum vanligt partafelag við einkarrætti til at taka sær av pantskipanini í Føroyum. Myndugleikarnir gera avtalu við Panta um einkarrættin, sum verður lýst í kunngerð.

Innflytarar og framleiðarar tekna partapeningin og hefta fyri felagið. Umsiting, rakstur og tænastur verður alt útveitt í so stóran mun sum gjørligt.

Brúkarin fer ikki at merkja broytingina á neiligan hátt, tí hann rindar og fær aftur sama lógarásetta pant sum áður og verður í eini betri støðu, tí pantskipanin verður betur samskipað.

Í avtaluni millum Panta og myndugleikarnir kann verða tilskilað, at myndugleikarnir hava eftirlit við felagnum, soleiðis at útreiðslurnar verða hildnar á so lágum støði sum gjørligt, m.a. við regluligum útboði, lítlari umsiting og altíð at tryggja fyrimunir fyri kundan.

Til dømis viðvíkjandi:

- Innsavning
- Skráseting
- Yvirskotspanti

## 7. LØGFRØÐI OG FÍGGING

### 7.1 Fígging

Tað er greitt, at ávísir byrjanarkostnaðir verða, og at fígging skal til, fyri at Panta kann fara til verka.

Inntøkurnar skulu koma frá tveimum keldum:

- Eitt eingangsgjald verður kravt, tá eitt nýtt ílat skal lesast inn í skipanina
- Við sølu rinda innflytarar/framleiðarar eitt gjald til Panta innan fyri eina avtalaða gjaldsfreist

Hetta gjaldið skal svara fyri kostnaðin fyri innheintan, móttøkusamsýningar til handlarnar, telduskipanir, tænastugjald til móttøkustøð og starvsfólk. Innflytarar og framleiðarar stilla eina bankatrygd, sum svarar til teirra árligu sølu í meðal. Panta rindar fyri kostnaðin av at hava eina bankatrygd. Pantið sjálvt verður eisini rinda við sølu og innan fyri eina avtalaða gjaldsfreist.

Brúkararnir fáa pantið aftur frá Panta gjøgnum ymsu móttøkustøðini, og móttøkustøðini móttaka eina móttøkusamsýning frá Panta.

Panta útveitir meginpartin av sínum virksemið, og av tí at Panta skal tryggja lágar prísir til brúkaran, verður virksemið regluliga tillagað.

Pant, ið ikki verður útgoldið, verður nýtt til eina framhaldandi útbygging av pantskipanini, í fíggingini av virkseminum í Panta, til nýmenning á umhvørvisøkinum og til vælgerandi endamál.

### 7.2 Løgfrøði

Sum nevnt, er neyðugt, at avtala verður gjørd millum landið og P/f Panta um einkarrætt til pantskipanina í Føroyum. Hesa avtalu má Innlendismálaráðið lýsa í kunngerð.

Harafturat verður mælt til, at pantið verður stillað eins, uttan mun til hvørja støddd íløtini hava, til dømis kr. 2,- . Hetta fer at lætta um umsitingina og sundurskiljingina.

Broyting má gerast í lógini um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir, har kravið, um at allir handlar skulu taka ímóti teim íløtum, sum teir selja, skal takast burtur. Hetta kemst av, at avtalan við Panta víðkar reglugerðina til, at handlar fara at taka ímóti øllum íløtum, sum verða seld í føroysku pantskipanini. Møguleiki skal tó verða at søkja Panta um undantaksloyvi í økjum, har borgarin hevur nóg mikið av innlatingarstøðum at velja í.

Pant eigur harafturat at verða lagt á endurnýtsluíløt, sum verða keypt í Tax Free ávegis til Føroyar, og sum tískil koma í umferð í Føroyum.

## 8. LANGTÍÐAR MÁL

Av tí at talan er um eina heilt nýggja skipan, verður væntað, at rúm má verða fyri, at tillagingar verða gjørdar fyrstu tíðina, men hetta verður væntandi ikki nakað brúkarin fer at leggja merki til.

Harumframt er tað neyðugt, at skipanin er smidlig og hevur møguleika fyri at fylgja við tíðini. Bæði viðvíkjandi eftirspurninginum hjá brúkaranum men eisini tøkniliga framburðinum. Panta má til allar tíðir vera viðkomandi, um settu málini skulu røkkast.

Uppskotið, sum her fyriliggur, er fyrsta stig at fáa P/f Panta sett á stovn og til verka. Uppskotið leggur upp til at samskipa núverandi innsavning í eitt felag, men um hugt verður longur fram, verður miðað eftir at hava størri móttøkustøðir kring alt landið, sum taka ímóti øllum endurnýtsluíløtum, møguliga nærhendis brennistøðum ella líknandi. Málið hjá Panta er at vera har brúkarin er, og mett verður, at brúkarin eisini ynskir at sleppa av síni endurnýtsluíløt, har annað endurnýtslutilfar verður latið inn í sambandi við rudding og burturbeining.

## 9. ENDALIGAR VIÐMERKINGAR

### 9.1 Gildiskoma

Mælt verður til at nýggja pantskipanin við P/f Panta verður sett í gildi 1. januar 2019. Tíð má setast av til at fáa eina avtalu í lag við donsku myndugleikarnir, sum skal viðurkenna føroysku skipanina. Eisini skal avtala gerast millum føroyskar myndugleikar og P/f Panta um einkarættan til fløskupantskipanina. Tá ið avtalan við danir er



komin í lag, kann P/f Panta verða sett á stovn og fyrireikingarnar upp á virksemið byrja. Ein stórur partur av virkseminum skal veitast út, og hetta skal fyrireikast. Í verandi støðu eru nakrir partar av núverandi pantskipan partur av Dansk Retursystem. Tá ið nýggja skipanin kemur í gildi, verður hetta ikki galdandi longur.

**9.2 Næsta stig**

Handilsvinnufelagið mælir til, at Heilsu- og Innlendismálaráðið setur saman ein arbeiðsbólk, sum syrgir fyri, at karmarnir kring nýggju pantskipanina fáast upp á pláss, soleiðis at P/f Panta kann setast á stovn. Mælt verður til, at arbeiðsbólkurin verður settur saman við einum umboði úr Innlendismálaráðnum, einum úr Vinnumálaráðnum og tveimum umboðum úr Handilsvinnufelagnum.

HANDILSVINNUFELAGIÐ

SENDISTOVAN